VÁGA KOMMUNA

# *Reglugerð*

*um umsiting av bíðilista til grundstykki í Vága kommunu*

**§ 1.** Umsókn um grundstykki í Vága kommunu skal latast kommununi skrivliga.

*Stk. 2.* Tilskilast kann í umsóknini í hvørjari bygd, grundstykki ynskist. Umsøkjarin fær tá bert boðið grundstykki, sum eru tøk í tilskilaðu bygdini/bygdunum.

*Stk. 3.* Er einki tilskilað í umsóknini um, í hvørjari bygd, grundstykki ynskist, fær umsøkjarin boðið grundstykki í teirri bygd í kommununi, har grundstykki eru tøk.

**§ 2.** Fyri at vera settur á bíðilistan, skal umsøkjarin vera fyltur 18 ár.

*Stk. 2.* Umsøkjari, sum longu eigur kommunalt grundstykki í Vága kommunu ella sum er giftur við ella livir saman við persóni, sum eigur kommunalt grundstykki í Vága kommunu, kann ikki verða uppskrivaður á bíðilistan.

**§ 3.** Umsøkjari, sum lýkur treytirnar í § 2, verður settur á bíðilistan, tá viðkomandi hevur rindað kommununi kr. 10.000 í depositum.

*Stk. 2.* Upphæddin, sum rindað verður í depositum sambært stk. 1, verður góðskrivað umsøkjaranum, tá viðkomandi keypir grundstykkið frá kommununi.

*Stk. 3.* Velur umsøkjari at taka seg av bíðilistanum, verður upphæddin, sum rindað er í depositum, afturgoldin uttan rentu.

**§ 4.** Tá grundstykki er tøkt, verður tað boðið umsøkjaranum, ið stendur fremst á bíðilistanum. Tekur viðkomandi ikki av, verður stykki boðið tí, sum stendur næst á bíðilistanum, og soleiðis frameftir.

*Stk. 2.* Tekur umsøkjari ikki av tilboð um kommunalt grundstykki tríggjar ferðir á rað, verður viðkomandi fluttur aftast á bíðilistan.

*Stk. 3.* Fíggjarnevndin kann geva loyvi til at býta um grundstykki millum teirra, sum hava fingið tillutað ella sum hava keypt grundstykki frá kommununi. Ikki er loyvt at fáa peningaligan vinning burturúr slíkum umbýti.

**§ 5.** Bíðilistin til grundstykkir hjá Vága kommunu verður umsitin av kommunalu umsitingini, sambært hesi reglugerð.

*Stk. 2.* Fíggjarnevndin kann í heilt serligum førum loyva fráviki frá reglugerðini.

VÁGA KOMMUNA

Samtykt á býráðsfundi 21.12.2020

Eyðdis H. Niclasen
*borgarstjóri*

Jóhan Hendrik Ellefsen
*kommunustjóri*